

**Navn:** Jón Krosslá Poulsen
**Føðingardagur:** 17. februar, 1988
**Tjóðskapur:** Føroyar
**Pláss:** Framherji
Spældi fyri fyrstu ferð á besta liðnum hjá VB fyri gott og væl seks árum síðan. Hann varð innskiftur í seinna hálvleiki, tá B68 vann 3-2 í Vági hin 12. september í 2004.
Jón Krosslá Poulsen hevur spælt 131 landskappingardystir fyri barndómsfelagið, og hann hevur skotið 56 mál.

*kelda: www.faroesoccer.com*

# GYLTA MÁLIÐ

**Jón Krosslá Poulsen hevur skotið flest mál fyri FC Suðuroy nakrantíð. Tá hann javnaði við beinleiðis frísparki í gjár, vann hann seg upp á tindin yvir leikararnar, sum hava skotið mál fyri FC Suðuroy**

Uni Holm Johannesen

- Eg legði beinanvegin til merkis, at tað var eitt stórt hol í verjugarðinum. Tveir mótstøðumenn stóðu við síðurnar av verjugarðinum, og eg visti beinanvegin, at eg skuldi skjóta í tóma rúmið. Tíbetur, kann eg siga, greiðir Jón Krosslá Poulsen frá.

Tað tóktist lætt og einfalt. Hann smekkaði til, og Meinhardt Joensen, sum aftur vardi málið hjá B36, hevði ikki stórvegis møguleika at verja fyri.

Málið hevði sera stóran týdning. Jón Krosslá Poulsen javnaði við beinleiðis fríspark, tá seinni hálvleikur var fimm minuttir gamal. Hann gav av álvara barndómsfelagnum luft undir veingirnar. Tá avtornaði vann FC Suðuroy við tveimum málum móti einum á B36, sum vitjaði í Vági.

Tað er eitt.

Men gylta málið hjá Jón Krosslá Poulsen hevði eisini við sær, at 22 ára gamli vágbingurin hevði skotið flest mál fyri FC Suðuroy – fyrr VB og VB/Sumba - nakrantíð.

Tað upplýsir Suðuroyarportalurin.

## Altíð skotið mál

Jón Krosslá Poulsen hevur fyrst og fremst staðfest sítt navn í føroyskum fótbólti, tí hann hevur máltev sum fáur.

Framherjin var 16 ára gamal, tá hann skeyt síni fyrstu mál fyri barndómsfelagið. Hann stóð fyri tveimum av málunum, tá VB vann 4-2 á útivølli móti GÍ í seinsta umfarinum í 2004.

Seinnu árini hevur hann skotið eina rúgvu av málum í bestu og næstbestu deildini. Jón Krosslá Poulsen átti sera týðandi leiklut, at VB/Sumba – sum broytti navn til FC Suðuroy undan kappingarárinum í ár – vann sær uppflyting í bestu deildina í fjør. Hann skeyt 25 mál í 22 dystum.

Jón Krosslá Poulsen hevur nú skotið 56 mál fyri FC Suðuroy, og tað er málmet. Tí var einki at siga til, at framherjin varð heiðraður, tá hann var skiftur út, tá lítil løta restaði í.

Egil Steintórsson átti metið undan honum. Hann skeyt 55 mál í 126 landskappingardystum, veit Suðuroyarportalurin at siga.

## Alt á gosi

Jón Krosslá Poulsen og FC Suðuroy vunnu seg av aftasta plássinum í gjár. Mamouka Toronjadze skeyt sigurmálið, tá 10 minuttir restaðu í av dystinum. Hann smekkaði til úr góðari støðu og tryggjaði somuleiðis sigurin.

Jón Krosslá Poulsen er ovurfegin, at tað eydnaðist liðnum at vinna.

- Tað er torført at lýsa sigurin við orðum. Vit vóru undir trýsti seinastu løtuna og royndu at verja sum frægast. Tíbetur hóraðu vit undan. Vit hava runnið í mótbrekku seinastu mánaðirnar, men hesin sigurin heldur av álvara lív í vónini, at vit sleppa undan niðurflyting, sigur Jón Krosslá Poulsen.

B36 var á odda í hálvleikinum. Klæmint Matras legði gestirnar úr høvuðsstaðnum framum, tá fyrri hálvleikur var hálvrunnin. Hann stýrdi bóltinum í málið við høvdinum, aftaná innlegg frá Hjalgrími Elttør.

Jón Krosslá Poulsen staðfestir, at Jón Pauli Olsen, venjari, gav leikarunum av grovfílinum í hvíldini. Tí var heimaliðið sum hamskift frá byrjan í seinna hálvleiki.

- Vit eru til reiðar at stríðast fyri okkara møguleika nú, sigur toppskjúttin í Vági.

FC Suðuroy eru í løtuni bara tvey stig frá bjargingini við níggju dystum eftir at spæla.

### FC Suðuroy – B36 2-1 (0-1)

**0-1: Klæmint Matras, 20.**
**1-1: Jón Krosslá Poulsen, 50.**
**2-1: Mamuka Toronjadze, 79.**
Dómari: Lars Muller

**FC Suðuroy:** Stanislav Kuzma – Martin Tausen, Kasper Schultz, Heini Vatnsdal, Heini Bech – Henning Joensen (Arthur Tausen, 81.), Palli Augustinusen, Teitur Tausen, Tóki Brattalíð (Brandur Suðuroy, 69.) – Jón Krosslá Poulsen (Jónar Borg Dahl, 89.), Mamuka Toronjadze
***Gult kort:*** Martin Tausen og Heini Bech
***Venjari:*** Jón Pauli Olsen
**B36:** Meinhardt Joensen – Jónas Tór Næs, Dmitrije Jankovic, Odmar Færø, Símun Joensen (Fróði Clementsen, 86.) – Klæmint Matras, Bárður Olsen, Heini í Skorini (Rúnar í Lon Jacobsen, 85.) – Christian Mouritsen, Stig-Roar Søbstad (Høgni Eysturoy, 56.), Hjalgrím Elttør
***Gult kort:*** Jónas Tór Næs
***Venjari:*** Sigfríður Clementsen